SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## Leiðbeining við oyrnaskurðviðgerð - Tympanoplastik/Myringoplastik

NB: Undan skurðviðgerðini skal oyrað vera turt. Rennur úr oyranum, skalt tú seta teg í samband við Oyrna-Nasa-Hálsdeildina alt fyri eitt.
Vanligt er at møta sama dag sum skurðviðgerðin verður gjørd.
Snýr tað seg um eitt barn, verður annað av foreldrunum innlagt saman við barninum. Annað av foreldrunum fylgir barninum allan vegin, til tað er sovnað á skurðviðgerðarstovuni.
Gongst eftir ætlan, verður tú vanliga útskrivað/ur sama dag sum skurðviðgerðin.

**Kvøldið fyri skurðviðgerðina skalt tú fasta frá midnátt:**

**Ásetta dagin møtir tú vanliga kl. 07:30 á deildini:**
Fyrireikingar á deildini:
Tablettir, tilráddar av narkosulækna verða givnar. Børn fáa EMLA-plástur (lokaldoyvandi) á handabakið.
Undir skurðviðgerð skalt tú ikki hava neglalakk á, heldur ikki ringar, hálsprýði ella tílíkt. Langt hár skal vera bundið upp, og møguliga rakað burtur 1-2 cm omanfyri oyrað.
Skurðviðgerðin fer fram í fullari doyving og varir í 1-1½ tíma. Av skurðgongini kemur tú í viðraking, har fólk eru um teg, til tú ert heilt vakin og verður koyrd/ur aftur á deildina. (Annað av foreldrunum er við barninum inni á viðrakningini).

**Aftaná skurðviðgerðina:**

Í skurðviðgjørda oyranum liggur tvørra (gaze-strimmul) við salvu. Hendan skal liggja í oyranum í 3 vikur.
Hetta tíðarskeið hoyrir tú tí lítið og onki við oyranum. Sig frá um tvørran dettur úr í úrtíð!
Um tú hevur pínu í oyranumaftaná skurðviðgerðina, verður tilmælt at nýta Panodil. Annars fylgir vanliga lítil og ongin pína við skurðviðgerðini.
Um nógv pína ella fepur kemur fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina, set teg so í samband við deildina á tlf. 304622

**Treytir fyri at røkka besta úrslitinum aftaná skurðviðgerðina**
Vatn má ikki koma í viðgjørda oyrað, orsakað av vanda fyri bruna, tí er gott um tú fært hjálp at vaska hárið fyrstu tíðina.
Bíða við svimjing í 1-2 mánaðir, tá skuldi oyrað verið lekt, uttan so oyrnalæknin sigur annað.
Ikki snýsa tær ella njósa fyrstu 3 vikurnar aftaná skurðviðgerðina, tí hetta økir um trýstið í oyranum. Verður tú noydd/ur at njósa, so opna munnin samstundis!
Ikki gera filmleik/ítrótt fyrstu 3 vikurnar. Ikki lyfta tungt.
Skalt tú flúgva, so ráðfør teg við oyrnalæknan fyrst.

**Eftirkanning hjá oyrnalæknanum:**

Fyrsta kanningin er 3 vikur aftaná skurðviðgerðina, og tá verður tvørran tikin úr oyranum. Onnur kanningin er uml. 3 mánaðir aftaná skurðviðgerðina, og tá verður hoyriroynd gjørd. Oyrnalæknin tekur støðu til, um neyðugt er við fleiri eftirkanningum.

**Sjúkramelding:**
Eftir avtalu við oyrnalæknan.

**Skúli:**
Er talan um eitt barn/skúlanæming, er ongin forðing fyri at farið verður aftur í skúla 1-2 dagar aftaná skurðviðgerðina.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo